


**Kirkjugarður** *á Svínaryggi*

Óli Jacobsen
olijacobsen@post.olivant.fo



# Harald á Trappuni fyrsti formaður í KÍ

**Havnarmenn hava roynst væl í Klaksvík. Besta dømið um tað man vera Faktorin Johan Christian Djurhuus. Her fara vit at greiða frá Haraldi Haraldsen av tí kendu ættini á Trappuni í Havn. Hann gjørdist fyrsti formaður í KÍ**

Brøðurnir á Trappuni í Havn eru ímyndin av okkara sluppfiskiskapi, sum byrjaði í 1872. Tað vóru brøðurnir Petur og Dánjal Haraldsen, sum saman við Dia á Vertshúsinum keyptu Fox, sum fekk henda søguliga leiklut. Beiggin Niclas Haraldsen gjørdist skipari.

Harald Haraldsen var føddur í 1881 í Tórshavn. Hann var eldri sonur Onnu Elisabeth f. Qvivig av Mýrini í Nólsoy og Dánjal Jacob Haraldsen á Trappuni.

Tey fingu umframt Harald eisini Niclas f. 1884, uppkallaður eftir pápabeiggjanum Niclas, sum doyði í 1882. Yngri Niclas var uttan iva ein lovandi ungur drongur. Hann spældi í Havnar Hornorkestur, men hann doyði longu í 1905.

### Fór ungur niður á handilsskúla

Petur Alberg greiðir soleiðis frá Haraldi:

Pápi og Harald á Trappuni fylgdust aftur frá Keypmannahavn við “Lauru” 19. ella 20. august 1901. Haraldur hevði verið á Handilsskúla og ætlanin var, at Poul (beiggi Petur Alberg) og hann skuldu byrja handil í Geil.

Pàpi og Haraldur høvdu verið nógv saman í Keypmannahavn, og hann gekk nú ofta niðri í Geil ta fyrstu tíðina, og so vóru projektir smíðaði.

Tað er neyvan nakað komið burtur úr hesum. Í 1904 er Harald í hvussu er í Klaksvík. Tað kann hugsast, at hann fyrst hevur starvast í úthandlinum, sum Klaksvíkshandilin hevði í Havn.

Hann hevur starvast í handlinum úti í Klaksvík ella á Biskupsstøð, sum Klaksvíkshandilin átti – møguliga báðum. Hann verður í onkrum heimildum róptur ”udstationeret handelsbetjent”.

Í 1904 verður KÍ stovnað, og Harald gjørdist fyrsti formaður í felagnum.

Harald var á ungum árum eisini á fútaskrivstovuni, og hann vikarieraði eitt skifti sum sýslumaður í Klaksvík.



*Her er barnadópur hjá Haraldi beint eftir at konan er deyð. Á aftara rað eru f.v. Anna, Harald og Lisa. Í fremra rað Ásmund, Thorstein, Anna Helena og Ása*



*Húsini hjá Haraldi, sum hann bygdi í 1908. Húsini gjørdust til Hans Andriasar hús, har MFÁ, meginfelagið hjá áhugaleikarum, hevur skrivstovu*

### Konan doyði dagin eftir at hava átt

Haraldur er aftur í Havn í 1905. Stutt eftir giftist hann við Onnu, f. Debes úr Havn, fødd í 1882.

Anna var dóttir Elisabeth Maria Hansen f. 1850 í Havn og Niels Christoffer Debes (1852-1932) eisini í Havn.

Anna átti systkini Samuel f. 1881, Hans f. 1887 og Christian Carl f. 1890.

Anna og Harald fingu seks børn fødd millum 1907 og 1918. Men Anna doyr dagin eftir, at yngsta barnið er føtt. Tað hevur ikki verið lætt hjá einum einsamallum pápa, og børnini fara til fosturs hjá skraddaranum í Hoydølum, Johannes Nolsøe, ættaður úr Nólsoy.

Skraddarin var systkinabarn Harald, og hann var ógiftur. Húshaldirska hjá skraddaranum var “Tanta í Hoydølum”. Hon var ættað úr Klaksvík, systir Jógvan og Jacob við Stein, pápa Hans Sundstein. Tanta misti mammu sína 2-ára gomul og kom til fosturs á Trappuni í Havn. Hon vaks upp sum fostursystir hjá Haraldi.

### Vrakaraformaður

Komin til Havnar fekst Harald við handilsskap og umboðan. Hann bygdi húsini undir Pisuvarða, omanfyri Sjónleikarhúsið, sum Hans Andrias Djurhuus keypti og búði í til sín deyðadag. Tey verða enn kallað Hans Andriasar hús.

Í 1912 gjørdist Harald vrakaraformaður. Saman við starvsfelaganum Niels Niclasen setti hann í bløðini eina grein um fiskavraking.

Her vísa teir til eina nýggja lóg frá 1. apríl 1912, sum ásetti, at allur klippfiskur, sum skuldi verða útfluttur eftir 1. apríl 1913 skuldi verða vrakaður eftir herdum reglum viðvíkjandi góðsku og støddir.

Teir greiddu frá, at teir høvdu verið á eini ferð í Íslandi fyri at kunna seg um, hvussu íslendingar viðgjørd fiskin. Og tá íslendingar høvdu vunnið sær eitt gott navn á marknaðinum, løgdu teir dent á tey punkt, har íslendingar vóru betri enn føroyingar.

»Islændinge er absolut længere fremme med Hensyn til Behandling og Afsætning end Færingerne, og den opfattelse som mange Færinger har, at færøsk Fisk er bedre end islandsk er fejlagtig, i altfald hvad Fiskens udseende angaar, men vor fisk maa kunne blive en finere vare ved omhyggelig Behandling end en stor Del af den islandske, da den af Natur er af en finere Kvalitet.«

Síðan er ein frágreiðing um, hvussu fiskurin skal handfarast.

Tað kann í hvussu er sigast, at hesar vegleiðingar vórðu tiknar til eftirtektar, tí seinni var eingin ivi um dygdina á føroyska klippfiskinum.

### Gjørdist oljukongur

Harald slepti fiskavrakingini og gjørdist stutt eftir umboð fyri Det Danske Petroleums Aktieselskab DDPA.

Hetta var fyrsta oljufelag, sum fekk sær umboðsmann í Føroyum, og tað varð Harald. Nær hetta er hent er eingin sum rættiliga veit. Men tað hevur í hvussu er verið í 1918. Hann gjørdist tískil Føroya fyrsti oljukongur!

Hann hevði eisini umboð fyri eitt tryggingarfelag. Eisini átti hann Skansapakkhúsið, har løgmaður situr í dag.



*Anna Haraldsen gjørdist bert 34 ár*



*ANNA HARALDSEN F. DEBESS F. 2. FEBRUAR 1884 D. 21. NOVEMBER 1918 Her liggur eisini Harald Haraldsen (20.10.1881-21.6.1926)*

Teir báðir Christian M Christiansen, Ludda Christian, og Harald høvdu fleiri ár heilt stóran heilsøluhandil saman. Men Cristian var ikki av tí berginum brotin at sláa seg til tols við tí, ið nú var komið áleiðis. Nei, teir fóru at fáa sær skip. Men tað var ikki nóg mikið. Teir skuldu eisini fáa í lag at reka stórhvalaveiðu. Og her var tað, at teir ovtóku seg, verður sagt í minningarorðum um Christian.

### Umsorgan fyri 100 árum síðani

Tá ið Harald bygdi í 1908 undir Pisuvarða fluttu pápin og pápabeiggin Pedda niðan hagar við honum. Hiðani var Petur borin út, tá ið hann í 1918 doyði 78 ára gamal sama ár sum Anna.

Dánjal, pápi Harald, doyði 82 ára gamal í 1919 uppi í Hoydølum hjá Johannes Nolsøe, skraddara, har hann livdi sítt seinasta ár.

Harald fær heldur ikki langa ævi. Hann doyr longu í 1926. Hann hevur reist konuni hendan vakra steinin, sum sæst á myndini, og tí er bert hennara navn á honum. Men Harald er so grivin undir liðini á konuni.

Børnini hjá teimum báðum vóru:

**Anna Christina** (1907-1994)

**Lisa** f. 1909

**Ása** (1910-2005.) Giftist í 1933 við Gunnar Mikkelsen (1905-1993) býráðsskrivara og tónaskald. Tey fingu børnini Sólvá, Torbjørn og Heðin.

**Ásmund** f. 1913. Giftist við Johannu Sofíu f. Joensen. Tey fingu børnini Harald, Ásla og Lis.

**Tórstein** f. 1915. Doyði 1999 á Ellisheiminum

**Anna Helena** f. 1918, tók seinni navnið á Trappuni

*Keldur:*
Árni Dahl og Heðin Mikkelsen.

*Rætting:*
Ein myndartekstur var skeivur í seinasta parti. Tað var sjálvsagt Jacobine, sum var tvíburasystir Mariu.

**Næsti partur**

Í komandi parti verður greitt frá Marin, dóttir Samuel Peter Frederik Rasmussen, sum prestur ikki vildi loyva at verða jarðaðan frá kirkjuni